# Fólkafundur á Háskúlanum ólavsøkuaftan 2025

Elisabeth Holm, adjunktur í føroyskum sum annaðmál, Fróðskaparsetur Føroya.

## *Mál, inklusjón og altjóðagerð heima*

Góðu tit øll, góðu fundarfólk, góðu ólavsøkugestir!

Tað er mær ein heiður at vera biðin at bera fram røðu á fólkafundinum í dag. Eg takki hjartaliga Háskúlafelagnum fyri álitið.

Í røðuni fari eg at hugleiða um mál í breiðari merking, her ímillum um føroyskt sum annaðmál, málpolitikk, fleirmæli og millummentanarliga fatan, og - ikki at gloyma - mál sum amboð til at lata dyr upp ella aftur. Alt hetta hevur við globaliseraða heimin at gera, við demokrati, heimsáskoðan, menniskjafatan, samleika og hugburð til mál. Hesi aktuellu evni eru beinleiðis knýtt at gransking mínari, sum í stuttum snýr seg um royndir hjá tilflytarum við at læra føroyskt og avbjóðingar, teir møta, tá ið roynt verður at sleppa framat faklærdum størvum. Tað eg havi granskað í, og framhaldandi fari at granska í, hoyrir til tvørgreinaða fakøkið FSA, ið er stytting fyri **føroyskt sum annaðmál**, ið er eitt lutfalsliga nýtt granskingarøki.

### *Hugleiðing um mál og føroyskt sum annaðmál*

Mál heimsins og málsligt margfeldi eru ómetaligir dýrgripir. Mál, íroknað teknmál, er í øllum, vit menniskju gera, hugsa og seta orð á. Tá vit læra eitt nýtt mál, verða dyr lætnar upp til ein nýggjan heim og aðrar mentanir. Mett verður, at umleið 7 túsund ymisk mál eru eftir, ið enn verða tosað, men nógv av teimum, nærum helvtin, eru undir so stórum trýsti, millum annað orsakað av kúgan, kolonialismu, vantandi rættindum og øðrum menniskjaskaptum valdsgerðum, at vandi er fyri, at tey ikki yvirliva sum mál. Hetta er at gera seg inn á menniskju, og á menniskjans ymiskleika; tað ger heimin og okkum fátækari, tí knýtt at hvørjum einstøkum máli er eitt ríkidømi av staðbundnari vitan. Eitt mál er bert livandi so leingi fólk aktivt brúka málið. Tað er ígjøgnum mál, at vit læra um okkum sjálvi og at skilja onnur. Tað er ígjøgnum eitt fyrsta mál, at vit læra eitt annað mál. Og, tað er við máli, at vit inkludera ella úthýsa onnur.

Í grannalandi okkara fyri norðan lat í 2017 ein nýggur stovnur upp, ið bæði er kendur undir navninum Verøld og hús Vígdisar, uppkallað eftir fyrrverandi forseta Íslands og fyrstu kvinnu í heiminum, ið gjørdist forseti. Enska heitið á Verøld er '*Vígdis International Centre for Multilingualism and Intercultural Understanding*'. Tað vil siga, at talan er um stovn, hvørs endamál er at stuðla og fremja fleirmæli og millummentanarliga fatan og samskifti. Hetta merkir ikki, at fremmand mál og fremmandar mentanir verða virðismettar hægri enn høvuðsmálið ella tjóðarmálið í landinum – tvørturímóti, tí kjarnan er, at ØLL mál eru virðismikil og samantvinnað við samleika og tað at vera menniskja. Tað er vert at hava í huga, tá ið hugsað verður um, at yvir hundrað ymisk tungumál eru móðurmál hjá fólki, sum búgva her í Føroyum, og eru hesi mál tí ein týðandi partur av teirra samleika.

Stovnurin Verøld, ið eg eri sera hugtikin av, er knýttur at deildini fyri fremmandamál á íslendska universitetinum, Háskóla Íslands; hann er góðkendur og undir vernd av UNESCO, ið er heimsumfevnandi ST felagsskapur, ið virkar fyri friði millum heimsins lond. At virða mál, fleirmæli, fjølmentan og millummentanarliga fatan er at virða menniskju.

Í endamálsorðingini fyri Verøld stendur *eisini*, at tað er týdningarmikið, at varðveita mál, at skapa tilvit um tann týdning, ið mál hava fyri mentanararv, at skapa tilvit um málpolitikk, ið er grundaður á fleirmæli, og at stuðla og fremja gransking í móðurmálum við at síggja ØLL móðurmál sum part av grundleggjandi mannarættindum.

Onkur hevur kanska hug at spyrja, hví málpolitikkur neyðturviliga skal vera grundaður á fleirmæli? Er tað týdningarmesta hjá okkum ikki, at føroyskur málpolitikkur *bert* fevnir um føroyskt, almenna málið og tjóðarmál føroyinga? Svarið til seinna spurningin er stutt og greitt NEI, men samstundis er tað givið, at ein føroyskur málpolitikkur setur tjóðarmálið í miðdepil. Hóast fáment, tosa vit eitt ríkt mál, ið ikki er livandi samskiftismál nakra aðrastaðni í heiminum (undantikið millum føroyingar, ið koma saman í øðrum londum), og eingin annar enn tað fólkið, ið her býr, kann varðveita og menna hetta mál. Tann leiklutur, ið Føroya Fólkaháskúli frá byrjan í 1899 hevur havt fyri føroyska málið, málsligt tilvit, vunnin málrættindi og tjóðarbygging, kann ikki metast nóg høgt. Hetta var fyrsti skúlin, sum burturav undirvísti á føroyskum. Í dag er stafettin koyrd víðari og ábyrgdina

av at tryggja, at málið verður nýtt og varðveitt sum eitt livandi mál, hava vit, sum nú liva.

Vit hava øll ábyrgd, eisini tá ið um ræður at inkludera, stuðla og rúma nýmæltum í føroyskum, teimum, sum í og uttan fyri skúlagátt strevast við at læra mál okkara, mangan undir korum, ið ikki eru til vildar. Stóru ábyrgdina eiga tó landsins myndugleikar, ið við orðum siga seg taka undir við altjóða yvirlýsingum, men í verki ikki altíð bera seg skilaliga at - ella lata sum luft. Dømi um yvirlýsingar, ið fevna um mál, eru: Dagførdi málpolitikkurin hjá Norðurlendska ráðharraráðnum frá 2024, mannarættindasáttmálin frá 1948 og heimsmálini hjá ST fyri burðardygga menning frá 2015. Við raðfestingum skulu myndugleikar skapa karmar og trygd fyri, at øll, ið vilja læra mál okkara, hava umstøður og atgongd til dygdargóða málundirvísing, eins og 4. heimsmálið ásetur. Eisini skal trygd veitast fyri, at føroyska málið áhaldandi verður ment á øllum økjum, verður granskað og fær kor, ið veruliga muna, nú fáment mál í talgilda heiminum eru í harðari kapping við størri mál. Her er mangt, ið liggur á láni.

Her vildi eg ynskt, at vit í Føroyum vóru meira framsøkin og framskygd – at vit høvdu stórar ambitiónir fyri mál okkara - til dømis við at verða ein fyrimynd fyri onnur fáment mál og máløki. Hví ikki seta á stovn ein altjóða granskingar- og vitanardepil fyri smá málsamfeløg við staðseting á okkara universiteti? Við alheimsgerðini er føroyskt - eins og onnur fáment, uppruna- ella minnilutamál - flutt inn í ein nýggjan veruleika, ið setur stór krøv til okkum á fleiri mótum. Tí er alneyðugt at styrkja samstarv bæði inneftir í samfelagnum og úteftir, at vit læra um onnur og av øðrum fyri at megna tær avbjóðingar og møguleikar, sum koma í kjalarvørrinum av alheimsgerðini. At hava tílíkan altjóða granskingar- og vitanardepil, okkara egnu Verøld her mitt í Norðuratlantshavinum, er vert at umhugsa!

Til at meta um, hvussu høgt myndugleikar okkara raðfesta vitan og málsliga burðardygd, tað at føroyskt skal yvirliva sum mál, so er ein mátistokkur at meta um tær íløgur, ið gjørdar verða í føroyskt í breiðari merking, og – lat meg undirstrika – eisini í føroyskt sum annaðmál. Hví? Tí at gera íløgur í føroyskt sum annaðmál er ikki bert viðkomandi og stuðlandi fyri máltøku, trivnað og inklusjón av tilflytarum og eftirkomarum teirra, men er samstundis ein íløga í málsliga burðardygd, til gagns fyri samfelagið og allar

málbrúkarar nú og í framtíðini, bæði fyri tey, ið hava føroyskt sum móðurmál og fyri tey, ið eru fleirmælt og nýmælt í føroyskum. Tíverri má eg siga, at her hava myndugleikar okkara veruliga sovið í tímanum.

## *Málpolitikkur*

Fyri at venda aftur til evnið málpolitikk, so var tað eitt frambrot í føroyskari málsøgu, tá skjalið *Málmørk – Álit um almennan málpolitikk* kom á breddan í 2007. Spurningurin er so, nú skjótt tvey áratíggju eru liðin, um øll tilmælini í hesum málpolitikki eru rokkin, og um fleirmæli hevur nakran leiklut? Hugtakið fleirmæli var ikki nevnt í álitinum, men har stendur – eg endurgevi – at: "*Ein ávísur partur av Føroya fólki eru útlendingar ella føroyingar, sum hava búð leingi uttanlands, og summi hava kanska ikki gingið í skúla í Føroyum. Tey hava sjálvandi ikki somu møguleikar at ogna sær førleika í føroyskum máli eins væl og tey, ið hava føroyskt sum móðurmál ella fyrstamál. Tað, at øll skulu hava rætt til mál, merkir, at øll skulu hava sama møguleika at nema sær førleika í føroyskum. Somuleiðis merkir tað, at tey, ið hava annað móðurmál enn føroyskt, skulu hava møguleika at menna og halda við líka sítt móðurmál í tann mun, tað almenna vil stuðla á hesum øki*" (s. 17). Føgur orð, men serliga í seinnu helvt av hesum sitati er talan um tóm orð.

Víðari stendur, at "*Harumframt eiga tiltøk, sum skulu styrkja føroyskt sum annað mál, meira miðvíst at verða sett í verk*". Gamaní eru smá fet tikin fyri at menna føroyskt sum annaðmál, millum annað tá ið Setrið í 2021 varð biðið um at skipa fyri partíðar diplomútbúgving á masterstigi fyri lærarar á øllum stigum í skúlaverkinum. 20 lærarar fingu prógv í februar í 2024, lærarar og eldsálir, sum uttan iva gera mun, har teir eru. Tað er tó givið, at hesir FSA-lærarar kunnu ikki lyfta uppgávuna einsamallir.

Tíverri var ikki møguleiki at bjóða útbúgvingina útaftur, hetta hóast tørvurin á lærararaum, ið hava vitan um annaðmálslæring er ovurhondsstórur og støðugt vaksandi. Støðan er alt annað enn góð, og alt ov nógv fremmandmælt børn og ung verða ikki loftað. Hetta er eitt vandamál, ein demokratisk avbjóðing, og ein skammblettur í skúlaverkinum. Vit hava til dømis kunngerð um FSA í fólkaskúlanum, ið ikki er grundað á vitan um annaðmálslæring. Harafturat vísa kanningar, at lærarar í nógvum førum ikki

meta seg vera fakliga ílætnir til at undirvísa børnum, ið hava aðra málsliga bakgrund enn føroyska. At lata standa til er einki minni enn ein katastrofa! Í roynd og veru hava *allir* lærarar ábyrgd, tí vit mugu ikki gloyma, at mál er partur av øllum lærugreinum.

Nýggj integratiónslóg var viðtikin í Løgtinginum í desember í fjør, sum áleggur, at tann, ið vil fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum, skal hava nøktandi málkunnleika í føroyskum. Tilflytarar, ið eru fevndir av lógini, fáa tilboð um ókeypis undirvísing í føroyskum sambært løgtingslóg um føroyskt sum annaðmál. Alt gott um tað, men hvør skal átaka sær hesa undirvísing? Hvør er dygdin og trygdin, tá ið lærarar, ið vilja nema sær vitan um annaðmálslæring ikki hava atgond til útbúgving og eftirútbúgving? Umframt útbúgving og eftirútbúgving, er neyðugt at tryggja hóskandi karmar.

Hóast ætlan mín ikki er at vera svartskygd, nú vit hátíðarhalda ólavsøku, so fari eg at loyva mær at siga, at tað er syrgiligt, so lítið framskygd og framsøkin vit sum land og tjóð eru, tá ið um ræður at menna føroyskt sum annaðmál og alt, ið hartil hoyrir. Ikki tí at vitan ikki er tøk í landinum, men tí at tilvit og rafestingar vanta. Mín egna gransking vísir millum annað, at ferðin inn í føroyskt hjá flestu teirra, ið luttóku í ph.d.-verkætlanini, er drúgv og avbjóðandi. Eisini vísir kanningin, at føroyski arbeiðsmarknaðurin megnar ikki nóg væl at inkludera fólk, ið hava annan uppruna enn føroyskan ella norðurlendskan. Umframt avleiðingar sum førleikamissur og marginalisering, ið sjálvsagt ávirka trivnað, var eyðsæð, at brostnir dreymar og 'laissez-faire' hugburður ávirka motivatión til at at læra seg føroyskt. Alt hetta er nærri lýst í bók mínari *Migration, Adult Language Learning and Multilingualism*. Kann leggja afturat, at nevnda bók er í uppskoti í Bretlandi til at fáa heiðursløn.

## *Framtíðin, inklusjón og altjóðagerð heima*

Fyri at venda hesum heldur dapra veruleika til nakað jaligt, so fari eg at enda við seta nakrar spurningar og tríva í, hvat vit sum samfelag kunnu gera fyri betur at stuðla máltøku hjá tilflytarum, fremja inklusjón og altjóðagerð heima.

Fyrst og fremst mugu vit seta okkum høg mál á integratiónsøkinum. Hvat meina vit við, tá ið vit tosa um integratión? Hvat samfelag vilja vit hava?

Hvønn leiklut hava skúlar, harímillum Føroya Fólkaháskúli, Setrið og allir útbúgvingarstovnar landsins, tá ið um ræður at seta inklusjón á breddan, og at virka fyri millummentanarligari fatan? Hvønn leiklut hava arbeiðsmarknaður, fyritøkur, privatir og almennir stovnar hesum viðvíkjandi? Vit eru ófør at seta krøv til onnur, men ikki eins ófør at seta høg krøv til okkum sjálvi. Liva vit sjálvi upp til tey krøv, ið integratiónslógin setur tilflytarum? Hvussu inkluderandi og javnbjóðis eru samfelagsskipanir okkara? Í hvønn mun vísa tú og eg og vit øll áhuga fyri teimum málum og mentanum, sum tilflytarar eru partur av? Hvussu er statt við vitan um, umsorgan og virðing fyri fólki úr øðrum londum, ið búleikast her? Og soleiðis kann ein halda áfram at grunda og spyrja. Gjøgnum yvirskipaðar ætlanir og politikk mugu vit tora at seta orð á, hvørji mál vit vilja røkka, hvat neyðugt er at raðfesta á inklusjónsøkinum og hví. At jabba upp í saman um, at um bara tilflytarar læra seg føroyskt, verða tey inkluderað, og eisini at fyrigykla sær, at so fara arbeiðsgevarar uttan himpr at lata dyrnar upp, er at halda fólk fyri gjøldur. Veruleikin er meira samansettur enn so.

Vit mugu gera upp við *ad hoc* og 'laissez-faire'-hugburð í ymsu geirunum í samfelagnum. Saman við viðkomandi áhugapørtum mugu brýr byggjast, til dømis millum útbúgvingarstovnar, ið veita annaðmálsfrálæru og arbeiðspláss. Ein ætlan fyri føroyskt sum annaðmál á øllum stigum í útbúgvingarverkinum er alneyðug – við tilhoyrandi íløgum, verksetan, gransking og útbúgving. Tað sama er galdandi fyri arbeiðsmarknaðin, ið krøv mugu setast til. Sum samfelag mugu vit vakna og fyrihalda okkum til tann demografiska veruleika, vit eru í.

Amboðini eru fólkið, ið her býr. Amboðini eru eisini ein endurskoðað útbúgvingarskipan, ið umframt høvuðsmálið rúmar fleirmæli og fjølmentan; ein politiskur myndugleiki, ið umframt heimlig viðurskifti virðir altjóða lóg, heimsmál og mannarættindi; og amboðini fevna um tað tilfeingi av mentanum og málum, ið eyðkenna Føroyar í 21. øld.

Lat ikki tey virði, eg í røðuni havi varpað ljós á, kámast burtur í hugsjónarliga mjørkanum og tosi um betong og kapital, ella í drepandi tøgnini. Meira nú enn nakrantíð fyrr hava vit sum samfelag tørv á at steðga á, rudda fyri egnum durum, endurskoða okkara sjálvsmynd og tey virði, ið vit vilja, skulu eyðmerkja okkum sum land og tjóð, sum medborgarar og heimsborgarar.

Vit liva í einari verð, har eirindaleysir valdsharrar og bølmenni dag og dagliga sorla øll tey virði, eg havi umrøtt, og sum enntá myrða frá hond, uttan at heimsins leiðarar, okkara íroknaðir, tala at. Við ikki at tala at verður tøgnin tað málið, ið ger okkum samsek og sigur meira enn orð kunnu lýsa.

At virða mál, fleirmæli, fjølmentan og virka fyri millummentanarligari fatan er at virða menniskju, okkara medmennsikju og menniskjans ymiskleika.

**Takk fyri og góða ólavsøku!**